Á blásiusmessu hugleiður Carl Johan Jensen rithøvundur um tjóðskap og sjálvstýri og tekur millum annað støði í gamla Sloan og uppgerð hansara við donsku kirkjuna

Sæland og fleiri afrikansk lond, har fólk við ymsum tjóðskapi hava staðið saman um at vinna sjálvstýrið innan sama landamark. Fleiri dømi eru eisini um, at tjóðskaparlig serstøða ikki hevur verið ein íleiðing til at seta fram krøv um politiskt sjálvstýri, eitt nú eru frísar dømi um tað. Eyðvitað kunnu tjóðskapur og tjóðskaparkensla kortini stuðla upp undir eina sjálvstýrisstremban, men byggir slík stremban á tjóðskapin einsamallan, verður hon aldri annað enn ein viðfáningur.

Í triðja lagi er tað løgið, at ein rørsla, ið ivaleyst eisini er ein tann mest avleiðingaríka rembingin í føroyskari mentunarsøgu tey seinastu hundrað og hálvtrýss árini, nær um ikki fær innivist í føroyskari og fyri alt tað danskari og aðrari útlendskari søguskriving um sjálvstýrismálið. Eg hugsi um vekingarrørsluna. Kristian Osvald Viderøe hevur í bygdasøguliga seksbindaverki sínum Saga (1991-1994) lýst, hvussu tað gamla føroyska bygdasamfelagið gekk til grundar við sínum sermerkta lívslag og siðum. Í tí gamla føroyska samfelagnum, sigur Viderøe – og tað staðfesta aðrar keldur við –, var kirkjan álitið hjá fólkinum og hjartað í bygdalívinum. Virðingin fyri kirkjuni og myndugleika hennara var ósvikalig og treytaleys. Eisini eigur at vera havt í huga, at kirkjan hevði eina sterka valdastøðu í føroyska samfelagnum væl inn í tjúgundu øld og var hartil tann parturin av danska yvirvaldinum í Føroyum, sum flest fólk í landinum komu í takføri við í gerandisdegi sínum. Kristian Osvald Viderøe setur í Saga fram ta grundáskoðan, at upploysingin, sum fór at gera vart við seg í tí gamla føroyska bygdasamfelagnum í seinnu helvt av 19. øld, ikki var ein samfelagsliga ella søguliga fyrilagað tilgongd, ið hvussu er ikki nútíðarligari merking. Kveikin, sum fekk alt í gongd og hevði við sær, at øll andlig og mentunarlig viðurskifti at enda lógu í sundurloysn, heldur Viderøe vera lærguna, sum William Sloan slóðaði fyri í Føroyum, og framferðina hjá samkomunum, ið vóru stovnaðar við støði í hesum boðskapi. William Sloan kom til Føroya fyrstu ferð miðskeiðis í 1860´unum og eitt av tí, sum eyðkendi boðskap hansara og eisini sermerkir vekingarrørslur eitt nú Bretlandi í 19. øld, var andstøða móti læruni hjá ríkiskirkjuni. Tann fyrsta røðan William Sloan flutti fram í Føroyum, hon var á donskum og varð hildin á einum útimøti á Kongabrúnni, er prentað í bókini – men Gud gav vøkst (1992) eftir Sigurd Berghamar. Í taluni segði William Sloan m.a. á heldur bronglaðum donskum: Nogen folks tanke som de ere Christens hvis de tilhørte at den Kirke; der er falsk at er en Satans Løgn at bedrage dem og lede til Helvede. Hann skuldi eisini, um Kristian Osvald er eftirfarandi, á einum øðrum møti peika áhoyrarunum á spírið á Havnarkirkju, ið sást daga upp um húsatekjurnar, og halda fyri, at um hatta hús stóðu helvitis logar.

Hava vit tátíðarumstøðurnar her á landi í huga, er lítið at ivast í, at hóast ørindini hjá Williami Sloan sjálvandi fyrst og fremst vóru at vekja fólk til andliga ella trúarliga umhugsan, so mátti slík tala kortini kennast sum ein politiskur landskjálvti, annaðhvørt maðurin, ið orðini átti, visti av tí ella ikki. William Sloan eggjar jú fólki at venda einum av meginstovnunum hjá danska yvirvaldinum í Føroyum bakið, einum stovni, sum í øldir hevði verið so samantvinnaður við ríkisvaldið, at har sum tað var var kirkjan altíð annar tráður. Og ikki bara tað, William Sloan ger tað beinleiðis til eina treyt fyri at vera kristin og vónini um himnavist, at tann trúgvandi skal havna ríkiskirkjulæruni. Hvat ið so annars kann sigast um boðskapin hjá Williami Sloan og seinni hjá brøðrasamkomunum, so er valla nakar ivi um, at hann fór sum ein rembing gjøgnum føroyska samfelagið og skakaði grundirnar ikki bert undir kirkjuni, men undir øllum tí politiska valdinum í Føroyum fyri og eftir aldaskiftið.

Onkuntíð fyrr hevur sum vera man valla á andstøðu móti tí danska embætisveldinum í Føroyum eins søgan og søgnin um Páll Nolsøe m.a. váttar, og misnøgdin jøvn og áhildin, men vekingarrørslan er tann fyrsta rørslan, sum hevur eina rættuliga uppgerð við ein danskan valdsstovn í Føroyum. William Sloan ferðaðist í 1870 árunum og fram eftir um landið oyggj úr oyggj og bygd úr bygd og kyndi eldar, har ið hann kom, og væl kann tað vera, at eldarnir vóru smáir, men hann og viðhaldsfólk hansara dugdu at halda teir logandi og sum frá leið vórðu teir til stór bál, eitt nú í Norðuroyggjum.

Vekingarrørslan, sum William Sloan kom við til Føroya í 1860´unum var, sum longu nevnt eingin politisk rørsla, tvørturímóti, men tað skerst kortini ikki burtur, at viðurskifti hennara við ein tann rótgrónasta, viðtøkasta og sterkasta stovnin hjá donskum yvirvaldi í Føroyum á avgerandi hátt var við til at skapa tann iva og kanska áræði við hjá vanligum fólki, ið var neyðugur til at skipa seg politiskt móti donskum yvirvaldi og tað var jú fyritreytin fyri, at sjálvstýriskravið kundi fáa høvdið fyri seg í føroyska samfelagnum. Tey harðligu og mangan ovursintu viðbrøgdini móti Williami Sloan og rørslu hansara hjá donskum yvirvaldsumboðum í Føroyum um og eftir aldaskiftið lata ongan iving vera um tað.

Hvør hevur so tann hugsjónarligi botnur verið, sum sjálvstýrisrørslan hevur bygt á hesi tætt við hundrað árini, hon hevur verið til.

Tingakrossur skrivar beint eftir fólkatingsvalið í 1901, tá ið Jóannes Patursson vann tepurt á Johan Hendrik Schrøter, at valið hóast úrslitið var lakari enn væntað, kortini gav góðar vónir um »det nationale demokrati.« Hetta við fólkaræðinum hevur alla tíðina verið fast samanvundið við føroysku sjálvstýrisstrembanin. Í so máta rekur føroysk sjálvstýrisrørsla fyri sama ráki sum fólkaræðisrørslan í Danmark í 19. øld og sjálvstøðisrørslurnar í Noregi og Íslandi. Tað mundi heldur ikki vera nøkur tilvild, at tilboðið tiltikna, sum átti at geva løgtinginum víðkaðar heimildir, eitt nú til einsamalt at ráða yvir øllum beinleiðis og óbeinleiðis skattainntøkum í landinum, varð lagt fram beint eftir tað sokallaða »systemskiftið« í Danmark í 1905, tá ið tingræði sum vit nú kenna tað umsíðir kom í lag.

Í einum lítlum bóklingi, sum Norrøna forlagið gav út í 1945, og nevndist Føroysk stjórnarmál ger Erlendur Patursson ta politisku støðuna upp, soleiðis sum hon hevði lagað seg frá krígsbyrjan. Í fyrsta parti av trimum í hesum bóklinginum viðger Erlendur Patursson amtsskipanina og bendir á, at føroyingar sjálvir hava lítið og einki at siga undir hesi skipan. Alt tað veruliga valdið er í hondunum á dønum og tí danska embætisvaldinum í Føroyum. Lóggávuvaldið er hjá danska ríkisdegnum og útinnandi valdið hjá amti og amtsfyrisitingini. Løgtingið afturímóti, ið er landsins fólkavalda ting hevur bert ráðgevandi vald og hetta ráðgevandi valdið, hesin lítli rætturin, løgtinginum er givin, er heldur ikki tryggur. Ríkisstjórnin kann, skrivar Erlendur Patursson, eftir galdandi lóg seta hann til viks nær tað skal vera og í øðrum lagi má vilji løgtingsins í veruleikanum altíð lúta fyri embætisvaldinum. Ein komandi stjórnar skipan, heldur Erlendur Patursson fram, skal tískil tryggja landinum fult fólkaræði. Tað skal vera fólkið, sum setur tær reglur, sum landið skal stýrast eftir, og tey, sum landinum stýra, skulu tæna fólkinum og í seinasta enda standa tí til svars. Í sama bóklingi tekur Erlendur Patursson upp spurningin um millumloysnir í stjórnarskipanarmálinum og viðger m.a. tað hann kallar »heimasjálvstýri« (bls. 20). Hann førir fram tríggjar grundir fyri, hví at ett slíkt heimasjálvstýri illa fer at bera til. Í fyrsta lagi, sigur hann, verður ringt at finna fram til á hvørjum málum, vit skulu ráða og hvørjum danir. Í øðrum lagi verður við hesum loysningi eingin friður skaptur í stjórnarmálinum. Tað verður sama orkuspillandi togan, heldur hann, millum føroyingar innbyrðis og millum føroyingar og danir (bls. 21). Í triðja lagi fær hitt føroyska samfelagið við slíkum heimasjálvstýri neyvan nóg mikið vald til at fremja mál síni á bestan hátt.

Í einum øðrum bóklingi Søgubrot og Føroyalands støða í dag, sum eisini kom út á sumri í 1945, setur táverandi formaður í fólkaflokkinum Thorstein Petersen fram nakrar hugleiðingar um sína og floksins støðu til spurningin um framtíðarstøðu Føroya. Thorstein Petersen gongur ikki fult so langt sum Erlendur Patursson í krøvum sínum um økt sjálvstýri, men talar tó fyri munaverdum og víðfevndum broytingum í stjórnarviðurskiftum Føroya. Grundgevingarnar hjá honum byggja tó í størri mun á tær búskaparligu og vinnuligu umstøðurnar, á at føroyski búskapurin hevur brúk fyri víðkaðum rásarúmi og liðiligari handilssamskiftum við umheimin, skal hann kunna mennast, sum hann hevur evni til. Vinnulívið, skrivar Thorstein Petersen (bls. 44), og politikkurin er eftir mínari áskoðan tað, ið hevur stórstan týdning fyri framtíðina. Framleiðslan er tað, ið skal skapa inntøkur og gera fólkið fært fyri at taka útreiðslurnar upp á seg. Syndarligt hevur gingist við tí studningi, vinnulívið hevur fingið frá tí almenna. Úrslitið er tí eisini, at tað neyvan man finnast eitt landaøki, ið er verri statt enn Føroyar við vinnulívsamboðum og framleiðslulíkindum, og hetta eiga allir føroyingar at leggja sær í geyma, tí hetta má vera fyrsta stigið til at fáa skil á, um landi okkara skal unnast ein lukkuligari framtíð. Thorstein Petersen ger í bók síni nógv burtur úr at lýsa ta politisku og búskaparligu gongdina í Føroyum frá seinast í tjúgunum og fram til 1945 og henda útgreining hansara er tað grundarlag , sum hann byggir kravið um økt sjálvstýri á. Høvuðsatfinning hansara móti teirri skipan, ið er galdandi, er at danska valdið og stuðlar teirra í Føroyum føra ein politikk, ið hevur sum fremsta mál at tryggja sambandið við Danmark. Hetta hevur við sær, heldur Thorstein Petersen fram, at tað er millum nakað og einki, ið verður gjørt fyri at menna føroyskt vinnulív. Eitt sterkt vinnulív styðjar upp undir sjálvbjargni og sjálvbjargni loysir í sínum lagi um bondini við Danmark og danska ríkið. So í staðin fyri at styðja tað, sum kundi skapa meiri arbeiði, skrivar Thorstein Petersen, og tí bera framgongd í sær, fóru teir (t.e. sambandsmenn og javnaðarmenn) at petta peningin (t.e. inntøkurnar hjá løgtinginum) sundur, so allar bygdir fingu hvør sín lítla snøkil – ein vegstubba ella okkurt annað – meðan landsins framtíð lá burturgloymd (bls. 70). Og leggur hann seinni afturat: Eitt tað óttafullasta hjá samfelagnum er, um almennur peningur verður nýttur sum politiskt útgjar, tí tá tapa teir, ið fáa peningin, meira enn teir beint í løtuni vinna við nøkrum fáum daglønum (bls. 95).



Tann fyrsta røðan William Sloan flutti fram í Føroyum, er prentað í bókini – men Gud gav vøkst (1992) eftir Sigurd Berghamar

Erlendur Patursson

Samkoman í Havn fyrst í 20.øld. Sitandi fremstur sæst gamli Sloan. Við vinstru lið hansara er Elsebeth Sloan. Menninir eru annars v.m. frá: Ludvig Poulsen, Hans David Niclasen, Eliesar Arge, Hest-Jóannes, Mitchell, ungur skoti, Hans Joensen, Niels Holm, Jens í Dali, Sophus Christiansen og so gamli Sloan. Kvinnurnar eru v.m. frá: Hanna Jacobsen, Maria Poulsen, Inga Jacobsen, Dea Arge, Kristianna Jacobsen, Elsebeth Sloan og Elsba Frederikka Henriksen úr Gásadali.
Mynd úr bókini »- men Gud gav vøkst«, eftir Sigurd Berghamar 1992.

Thorstein Petersen viðger eisini tey sosialu viðurskiftini og um tey hevur m.a. hetta at siga: Tann sociali spurningurin er ein táttur í samfelagslívinum, ið landastýrið má geva størsta ans. Um ikki fólkið sum heild hevur arbeiði og hevur góð kor, so má landið ganga til grundar (bls. 96). Men fyritreytin fyri, at landsins myndugleikar kunnu fáa munagóð tiltøk í verk á hesum øki er, at eitt meira fjølbroytt vinnulív verður skapt og peningur fingin til vega til at fáa í lag og styðja nýggjar vinnuvegir, nýggjan ídnað og ein nýmótans fiskiskap, men tað hevur afturhaldið ikki viljað, men í staðin dúva upp á danskar fíggjarveitingar og soleiðis undantikið føroyska samfelagið frá eini ábyrgd, tað átti at átikið sær. Hetta er skaðiligt, heldur Thorstein Petersen m.a. tí, at tað máar støðið undan ábyrgdarkensluni fyri samfelagnum yvirhøvur og ruddar slóð fyri, at almenningur peningur verður brúktur sum politiska útgjaring og ikki til at loysa átrokandi spurningar á haldgóðum støði. Og Thorstein Petersen læsir hugleiðing sína um tann sosiala spurningin av við hesum orðum: Tann sociali spurningurin má loysast sum ein heild og á føroyskum botni, tað fer at vísa seg at vera einasti vegur at ganga (bls. 97). Samanumtikið kann sigast, at grundgevingarnar hjá Thorsteini Petersen fyri, at ein nógv størri partur av lóggávu- og fyrisitingarvaldinum skal verða í Føroyum øðrumegin byggja á vinnuligar og hinumegin á fólkaræðisligar fyritreytir (t.e. økt sjálvstýri javnsvarar øktum fólkaræði). Meginatfinning hansara móti teirri skipan, sum var, var, at hon aftraði vinnuligum framburði og harvið allari samfelagsmenningini. Eyðvitað er tjóðskapur vovin í hesar hugleiðingarnar hjá Thorsteini Petersen serliga í tí partinum fremst í bókini sum viðger tað søguliga baksýnið, eitt nú leiklutin hjá Nólsoyar Pálli og tjóðskaparrørsluni, men tjóðskapurin er ikki høvuðsmynstrið.

Líta vit nú at okkara egnu samtíð og fullveldisrákinum, sum kom upp í hálvfemsunum í bakbrotunum frá kreppuni, eru grundgevingarnar fyri at taka fullveldi yvirhøvur eisini av samfelagsligum og búskaparligum slag og eitt skilligt afturljóð hoyrist frá tíðini beint eftir kríggið í tí, sum fyrisprákarar fyri fullveldi siga og skriva um ríkisrættarspurningin.

Tríggjar megingrundir verða førdar fram fyri róttøkari broyting av stjórnarligu viðurskiftum okkara. Eins og Thorstein Petersen í 1945 –og fyri ein part eisini Erlendur Patursson –vísa fullveldissinnað í fyrsta lagi á, at viðurskiftini millum lond eru stórliga broytt bæði handilsliga og í aðrar mátar tey seinastu tíggju, fimtan árini, og at føroyingar krevja tí at fáa víðkaðar heimildir eitt nú á uttanríkisøkinum, heimildir, sum skapa grundarlag fyri sjálvstøðugari umboðan við sjálvstøðugum atkvøðurætti í altjóða og millumlanda felagsskapum og ráðstevnum har vit halda tað vera neyðugt, tá vit halda tað vera neyðugt og um vit halda tað vera neyðugt. Hetta eru heimildir, sum tað ikki er møguligt at fáa undir núverandi ríkisrættarligu skipan.

Í øðrum lagi verður fært fram, at tann samtíðartillaging í føroyskum búskapi og føroyskari fyrisiting, sum er neyðug, skal føroyska samfelagið kunna fóta sær í nýggjari øld, krevur, at tann danska ríkisveitingin, ið sum er, er sterkasta, ja kanska einasta bandið millum Føroyar og Danmark, verður minkað burtur ella niðurlaðað. Vit hava ikki longur ráð at føra ein samfelagsligan og búskaparligan politikk, sum setur sambandið við Danmark ella ríkisfelagsskapin hægri enn atlitið til framtíð okkara sum land.

Í triðja lagi verður hildið fram, at fult fólkaræði krevur fult sjálvræði. Niðurstøðan er tí, at í tí politiska stríðnum fyri føroyskum sjálvstýri bæði fyrr og nú eru tað ikki fyrst og fremst tjóðskaparligir tónar, ið røra fólk í huga. Tvørturímóti, er tann tjóðskaparliga vefturin í tí ruðuleikakenda róminum, sum av fulveldiskjakinum stendst, ein heldur lítilláaður, einsligur og viðhvørt eitt sindur neyðarsligur ljómur. Helst kemst tað av, at tilvitanin um, at vit eru eitt fólk og ein tjóð, hóast hon langt burtur í frá er mótsagnaleys undir teimum korum, vit nú hava, kortini er ov sterk og ov sjálvssøgd.

Gravsteinurin hjá Sloan og konuni í Gamla Kirkjugarði við Dalavegin í Havn

Thorstein Petersen